## Ruiz kærir Valuev

Risastóri Nikolai Valuev vann herfyri dystin móti John Ruiz, tá teir báðir stríddust um rættin til tøka WBA-beltið í tungvekt. Men nú hevur liðið hjá Ruiz kært, tí tey meta, at talan var um snýt. Sagt verður, at legan hjá Valuev alla tíðina visti, hvussu dómaraatkvøðurnar fullu í hvørjum umfari sær, og at russiski risin tí hevði fyrimun. Team Ruiz hevur tí biðið týsku fyriskipararnar av dystinum um frumbondini av sjónvarpsupptøkunum, men enn eru hesi ikki útflýggjað.



## Koyra aftur í Parkini

Parken Sport & Entertainment og Grand Prix-serian í Speedway hava gjørt avtalu, sum tryggjar, at tað eisini verður kappast í Speedway í Parkini komandi fimm árini. Talan hevur verið um drúgvar samráðingar, men í tíðindaskrivi verður sagt, at báðir partar fegnast um semjuna, sum nú er funnin. Næsta koyringin í Parkini verður tó ikki fyrr enn 13. juni.

# Bragdaði hjá Bragdinum

**Talan var um satt bragd, tá Rúni Seloy og Bjørk Herup Olsen um vikuskiftið runnu seg til trý gullmerki í Danmark**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undan kappingini vóru vónirnar um heiðursmerki góðar. Bjørk hevði bestu tilmeldingartíð á 3000 metrum og næstbestu tíð á 1500 metrum. Rúni hevði frammandan triðbestu tíð á 800 metrum og fjórðubestu á 1500 metrum. Men har var lítið í millum, og væntandi var, at Rúni fór at renna nakað skjótari enn tilmeldingartíðirnar. Bjørk hevur runnið nógvar kappingar í ár, og sett 13 føroysk met. Hjá henni galt tí mest um at liva upp til tilmeldingina.

Fyrstu kappingarnar vóru leygardagin. Rúni legði bragdliga fyri á 1500 metrinum. Tók leiðsluna beinanvegin við einum skjótum fyrsta umfari. Hinir megnaðu so dánt at fylgja við, so Rúni helt bara fram við fullari ferð. Hetta vísti seg at vera rætti taktikkurin, tí feltið bleiv skrætt sundur, og Rúni helt leiðsluna allan vegin á mál, og endaði greitt fremstur, 4 sekund frammanfyri nr. 2. Tíðin, sum var 4.20,49 min, er eisini greitt persónligt og bólkamet. Fyrsta gullmerki varð komið til høldar!




*Talan var mest sum um uppvísing, tá Bjørk Herup Olsen púrasta einsamøll stýrdi kappingini á 3000 metrum*

*Mynd: Guttorm Sørensen*

Síðani var tað 1500 metrum hjá Bjørk. Hetta bleiv ein taktisk kapping, har Bjørk mest sum allan vegin lá í hølunum á skjótu Katrine T. Væsel. Havandi í huga kappingina dagin eftir, valdi Bjørk ikki fara út í ein harðan tvídyst við sterka danan, men heldur leggja seg eftir silvurmerkinum. Tá eitt umfar var eftir av kappingini, var feltið samlað, men nú bleiv ferðin skrúvað heilt upp. Og her vísti danin sína spurtstyrki við at vinna við góðum trimum sekundum framman fyri Bjørk, sum eisini vísti góða styrki, og endaði heili fýra sekund frammanfyri nummar trý. Ein fín kapping hjá Bjørk og eitt flott silvurmerki.

Longu sunnumorgunin klokkan 10.30 var finalan á 800 metrum hjá dreingjum. Átta teir sterkastu rennararnir í kongaríkinum stóðu klárir til start. Men heldur ikki hesuferð vísti Rúni nakra náði. Óræddur hamraði hann avstað, og afturumlegði fyrsta umfar uppá 60 sek. Seinna umfar minkaði ferðin nakað, og tá góðir 100 metrar vóru á mál, var tað ein, sum kom upp til Rúna, og ætlaði sær framvið. Men Rúni spenti í aftur, og rann seg trygt fram á mál og enn eitt gullheiðursmerki var í skjáttuni. Rúni betraði sína egnu tíð við trimum sekundum, og setti samstundis bólkamet, sum nú er 2.04.93!

Á 3000 metrum skuldi Bjørk liva upp til leiklutin sum favorittur. Hennara tilmeldingartíð var væl betri enn hinar, so hetta líktist mest einum avgreiðsluspurningi. Bjørk hevur í summar umboðað Danmark á júst hesum teininum í landsdysti við hinar norðurlendsku tjóðirnar, og setti tá føroyskt met við tíðini 10.19,63 min. Harumframt vann hon í februar DM-heitið innandura á hesum sama teini. Hesuferð rann hon einsamøll á odda allan vegin, og kom á mál við tíðini 10.30,63 min. Hon var 43 sekund ella umleið 200 metrar frammanfyri nummar tvey!

Eitt sannførandi gullmerki til Bjørk, og tað triðja danmarksmeistaraheitið til Bragdaíðkararnar!

Seinasta kappingin á breyt í ár verður FM fyri ung. Hon verður leygardagin 27. september, og eftir hetta verður farið undir fyrireikingarnar til vetrarvenjingina.

## Rúni vakti ans

**Bragdið hjá Rúna Seloy hevur eisini vakt ans hjá Dansk Atletikforbund. Á heimasíðu teirra skriva teir soleiðis:**




*Færing vinder dobbelt Hvidovre AM's færøske islæt, Rúni Seloy, tog sin anden guld, da han vandt 800 meteren. Hans vindertid 2:04,93min bliver ikke dårligere af, at han også næste år er at finde blandt de 14-15 årige. Her var der et flot niveau med seks løbere under 2:10min.*

## Tvær sensatiónir

**Cypriotiska Famagusta og rumenska Cluj-Napoca skaptu á útivølli hvør sína sensatión, tá fyrstu dystirnir í Champions League-bólkaspælinum vóru á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein sensatión, at Cypriotiska Famagusta yvir høvur kom við í Champions League bólkaspælið. Í gjárkvøldið fingu teir eisini sítt fyrsta stig í kappingini.

Famagusta spældi á útivølli móti týska Werder Bremen, og enn einaferð framdi cypriotisku meistararnir eitt bragd. Hesa ferð við málleysum javnleiki.

Talan var annars um mest sum einvíst trýst frá týska liðnum, men í málið vildi bólturin ikki.

Og eisini í Rom varð talan um sensatión. Har var rumenska Cluj-Napoca á vitjan, og teir tóku øll á bóli við einum 2-1 sigri.

Alt byrjaði annars væl hjá Roma, tá Panucci legði teir á odda eftir góðum korteri, men rumenska liðið hevði als ongan hug at geva seg. Og hóast heimaliðið fyri tað nógva var spælstýrandi, so gingu mótálopini við fullari ferð, tá Napoca hevði bóltin. Og tvær ferðir kundi Emmanuel Culio gera sær dælt av hesum, soleiðis at Roma sum ikki eina ferð mátti ásanna, at liðið ikki leverar vøruna, tá mest stendur á.

***Úrslitini í teimum fyrstu átta dystunum í ársins útgávu av Champions League, vóru annars hesi:***

**Bólkur A**

| | |
|---|---|
| Chelsea-Bordaux | 4-0 |
| Roma-Cluj-Napoca | 1-2 |

**Bólkur B**

| | |
|---|---|
| Panathinaikos-Inter | 0-2 |
| Werder Bremen-Famagusta | 0-0 |

**Bólkur C**

| | |
|---|---|
| Basel-Shahktar Donetsk | 1-2 |
| Barcelona-Sporting Lissabon | 3-1 |

**Bólkur D**

| | |
|---|---|
| PSV Eindhoven-Atletico Madrid | 0-3 |
| Marseille-Liverpool | 1-2 |

***Dystirnir í kvøld eru hesir:***

**Bólkur E**
Manchester United-Villareal
Celtic-AaB

**Bólkur F**
Steaua Bucharest-Bayern München
Lyon-Fiorentina

**Bólkur G**
Porto-Fenerbache
Dynamo Kiev-Arsenal

**Bólkur H**
Real Madrid-BATE Borisov
Juventus-Zenit St. Peterseburg